# Fiskimálaráðið

Dagfesting: 13-09-2021
Mál nr.: 21/17525-2

**Uppskot til**

**Løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um Trygdargrunn fiskivinnunnar**
(Heimild at áseta reglur um talgilt samskifti)

**§ 1**

Í løgtingslóg nr. 132 frá 28. desember 2010 um Trygdargrunn fiskivinnunnar verður í § 8 sum stk. 5 sett:
"*Stk. 5.* Landsstýrismaðurin kann áseta reglur um, at upplýsingar skulu skrásetast og sendast Trygdargrunni fiskivinnunnar talgilt og kann áseta nærri reglur um talgilta samskiftið."

**§ 2**

Henda løgtingslóg kemur í gildi 1. januar 2022.

## Kapittul 1. Almennar viðmerkingar

### 1.1. Orsakir til uppskotið

Lógaruppskotið er gjørt fyri at kunna fylgja rákinum í samfelagnum, har talgilt samskifti verður alsamt størri partur av samfelagnum. Landsstýrismaðurin ynskir heimild at kunna krevja, at samskiftið millum Trygdargrunnin og viðskiftafólk grunsins skal vera talgilt.

### 1.2. Galdandi lóggáva

Staðfest er, at heimild ikki er í galdandi lóggávu at gera ásetingar um talgilt samskifti. Neyðugt er tí at gera ásetingar, sum geva grundarlag fyri at krevja talgilt samskifti.

**1.3. Endamálið við uppskotinum**
Endamálið við uppskotinum er at lætta um trýstið í mun til umsitingarligt arbeiði við at áseta møguleika fyri kravi um talgilt samskifti.

**1.4. Samandráttur av nýskipanini við uppskotinum**
Lógaruppskotið ber í sær, at landsstýrismaðurin við stk. 5 í grein 8 fær heimild til at áseta reglur um talgilt samskifti.
Landsstýrismaðurin kann sostatt áseta, at tað er skylda hjá fysiskum og juridiskum persónum at brúka talgilt samskifti. Heimildin gevur eisini møguleika fyri at kunna áseta undantøk frá at brúka talgilt samskifti, t.d. um persónar hava fatanarligar ella kropsligar avmarkingar, ella ikki hava atgongd til teldu, internetsamband ella hava aðrar forðingar.

**1.5. Ummæli og ummælisskjal**
Lógaruppskotið hevur verið til ummælis hjá Fiskivinnuráðnum, Felagnum Trolbátar, Vørn og Trygdargrunni fiskivinnunnar.
.................
.....................

**Kapittul 2. Avleiðingarnar av uppskotinum**

**2.1. Fíggjarligar avleiðingar fyri land og kommunur**
Mett verður ikki, at lógaruppskotið hevur fíggjarligar avleiðingar fyri land og kommunur.

**2.2. Umsitingarligar avleiðingar fyri land og kommunur**
Mett verður ikki, at lógaruppskotið hevur umsitingarligar avleiðingar fyri land og kommunur. Tvørturímóti verður lógaruppskotið mett at stuðla undir, at bæði lóggávan og umsitingarliga arbeiðið verður lættari at umsita.

**2.3. Avleiðingar fyri vinnuna**
Mett verður ikki, at lógaruppskotið hevur fíggjarligar ella umsitingarligar avleiðingar fyri vinnuna.

**2.4. Avleiðingar fyri umhvørvið**
Mett verður ikki, at lógaruppskotið hevur avleiðingar fyri umhvørvið.

**2.5. Avleiðingar fyri serstøk øki í landinum**
Mett verður ikki, at lógaruppskotið hevur serligar fíggjarligar, umsitingarligar, umhvørvisligar ella sosialar avleiðingar fyri serstøk øki í landinum.

**2.6. Avleiðingar fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir**
Mett verður ikki, at lógaruppskotið hevur avleiðingar fyri ávísar felagsskapir. Mett verður heldur ikki, at lógaruppskotið sum so hevur avleiðingar fyri ávísar samfelagsbólkar, men kann tó hava ta avleiðing fyri serstakliga eldri íbúgvar og annars tey, ið ikki duga so væl at handfara talgilt samskifti, at talgilt samskifti kann kennast torført fyri hesi at handfara sum heild.

**2.7. Millumtjóðasáttmálar á økinum**

Mett verður ikki, at galdandi bindingar í millumtjóðasáttmálum gera, at lógaruppskotið fær fíggjarligar, umsitingarligar, umhvørvisligar ella aðrar avleiðingar fyri landsmyndugleikar, kommunumyndugleikar, ávís øki í landinum, ávísar samfelagsbólkar, ávísar felagsskapir ella vinnuna.

**2.8. Tvørgangandi millumtjóðasáttmálar**
Mett verður ikki, at lógaruppskotið er í ósamsvari við tvørgangandi millumtjóðasáttmálar, undir hesum við Evropeiska Mannarættindasáttmálan ella Sáttmála Sameindu Tjóða um rættindi hjá einstaklingum, ið bera brek.

**2.9. Markaforðingar**
Mett verður ikki, at lógaruppskotið elvir til markaforðingar.

**2.10. Revsing, fyrisitingarligar sektir, pantiheimildir ella onnur størri inntriv**
Lógaruppskotið hevur ikki ásetingar um revsing, panting ella sektir.

**2.11. Skattir og avgjøld**
Lógaruppskotið hevur ikki ásetingar um skattir ella avgjøld.

**2.12. Gjøld**
Lógaruppskotið hevur ikki ásetingar um gjøld.

**2.13. Áleggur lógaruppskotið likamligum ella løgfrøðiligum persónum skyldur?**
Lógaruppskotið áleggur ikki likamligum ella løgfrøðiligum persónum skyldur.

**2.14. Leggur lógaruppskotið heimildir til landsstýrismannin, ein stovn undir landsstýrinum ella til kommunur?**
Lógaruppskotið leggur einans heimildir til landsstýrismannin í fiskivinnumálum, men leggur ikki heimildir til annan landsstýrismann, stovn undir landsstýrinum ella til kommunur.

**2.15. Gevur lógaruppskotið almennum myndugleikum atgongd til privata ogn?**
Lógaruppskotið gevur ikki almennum myndugleikum atgongd til privata ogn.

**2.16. Hevur lógaruppskotið aðrar avleiðingar?**
Mett verður ikki, at lógaruppskotið hevur aðrar avleiðingar enn tær oman fyri nevndu.

**2.17. Talvan: Yvirlit yvir avleiðingarnar av lógaruppskotinum**

| | Fyri landið ella landsmyndug-leikar | Fyri kommunalar myndugleikar | Fyri pláss ella øki í landinum | Fyri ávísar samfelags-bólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|---|
| Fíggjarligar ella búskaparligar avleiðingar | Nei | Nei | Nei | Nei | Nei |
| Umsitingarligar avleiðingar | Nei | Nei | Nei | Nei | Nei |
| Umhvørvisligar avleiðingar | Nei | Nei | Nei | Nei | Nei |

| | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|
| Avleiðingar í mun til altjóða avtalur og reglur | Nei | Nei | Nei | Nei | Nei |
| Sosialar avleiðingar | | | Nei | Nei | |

## Kapittul 3. Serligar viðmerkingar

### 3.1. Viðmerkingar til ta einstøku greinina

**Til § 1**

**Til nr. 1**
*§ 8, stk. 5*
Við hesi áseting er heimilað landsstýrismanninum í fiskivinnumálum at krevja, at upplýsingar, sum skulu skrásetast og sendast Trygdargrunni fiskivinnunnar, verða skrásettar og sendar talgilt og at áseta nærri reglur um talgilta samskiftið annars.

**Til § 2**
Gildiskomuáseting.

Fiskimálaráðið, dagfesting

**Jacob Vestergaard**
landsstýrismaður

/ Rógvi Reinert

**Yvirlit yvir fylgiskjøl:**
Fylgiskjal 1: Javntekstur
Fylgiskjal 2:
Fylgiskjal 3: